




## Jens Marni syngur Gloria

Jens Marni Hansen var framúr góður í danska Grand Prixnum herfyri, og hann fekk stóra undirtøku frá dønum, sum atkvøddu. Eftir stendur ein frálík framførsla og ein fínur sangur. Leygarkvøldið spælir Jens Marni í Hvonn Live, og Gloria verður ein av sangunum, hann fer at tríva í.

## Tórður skiftir hest

Hann er kendur sum tann ídni veturin og reportarin í ítróttarsendingini 3-2, men nú gevst hann í 3-2 og fer í holt við aðra sjónvarpssending. Vit tosa við Tórð um drúgvu ítróttarvaktina í Kringvarpinum, um at rokast um vikuskiftini, og um at seta øðrvísi spurningar og vísa gleði fyri opnum skíggja.



## Orð og pappír

Virðislønti yrkjarin Peter Laugesen hevur givið eina øgrynnu av yrkingasøvnum út, og hann hevur eisini verið virkin sum upplesari – til dømis til jazztónleik. Tosað verður við Peter Laugesen um at seta orð á pappírið, og hvat tað er, sum pappír og orð í felag kunnu avrika.

